# Bilar

Nr. 220 • mikudagur • 16. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

### Mitsubishi Pajero Sport

| | | |
|---|---|---|
| Motorurin | 2.5 litur turbodiesel | Prísur |
| | 115 hk v. intercoolara | kr. 390.000,- sum persónbilur |
| Oljunýtsla | 9,5 km/l | kr. 285.000,- sum Van |
| Dekkstødd | 245/70-16 | Søluumboð |
| Stødd og vekt | | Ivan Johansen Bilar |
| Longd | 461,0 cm | Hoyvíksvegur 63 |
| Breidd | 177,5 cm | FO-110 Tórshavn |
| Hædd | 173,5 cm | Tel. 313666 |
| Eginvekt | 1.875 kg | www.ivan.fo |
| Viðførisrúm | | |

# Mitsubishi Pajero Sport




*Mitsubishi Pajero Sport er ikki sami bilur sum Grand Pajero, men er bygdur yvir Mitsubishi L200*



*Pajero Sport innan. Oman á instrumentborðinum er eitt multimetur við t.d. kumpass, oljutrýstmátara og voltmetri*




*Pajero Sport er sera væl útgjørdur við t.d. trinbrettum á síðunum, útbygdum skermum og alufelgum*

**Millum tær ymisku útgávurnar av Mitsubishi Pajero, er ein útgáva ið nevnist Sport, ið er ein væl útgjørdur luksusjeepur, ið fæst bæði sum persónvognur og sum Van við 2.5 litur turbodiesel motori**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mitsubishi Pajero hevur í mong ár verið ein kendur og væl umtóktur jeepur, sum hevur verið nógv brúktur av teimum, ið hava serligan flutningstørv sum t.d. koyring á vánaligum vegi, ella tey hava brúk fyri einum bili til at draga ein tungan trailara sum t.d hestatransport.

Pajero hava gjøgnum tíðirnar verið gjørdir í nógvum ymiskum útgávum sum t.d Pajero Pinin, sum var designaður av bildesignaranum Pininfarina í Italia, Grand Pajero, og so hesin Pajero Sport, sum er so gott sum sami bilur sum Mitsubishi L200 pick-up, sum fæst við bæði einkultari og dupultari kabinu.

Í nýggjastu útgávuni hevur Mitsubishi Sport fingið eina facelift við nógvum broytingum bæði innan og uttan. Innan fæst bilurin við leðurkabinu og titanium-panelum á instrumentbrettinum og hurðapanelunum. Oman á instrumentborðinum er eitt multimetur við temperaturmátara, kumpass, oljutrýstmátara og voltmetri, og undir loftinum er ein stór konsoll við fleiri rúmum.

Nógvir møguleikar eru við at leggja setrini niður, og við baksetrunum niðri verður vørurúmið stórt og arbeiðsligt. Uttan.eru eisini nógvar broytingar við t.d. nýggjum kølaragittari, for- og baklyktum og felgum.

Pajero Sport hevur 2.5 litur turbo dieselmotor við 115 hk. Bilurin kann draga ein trailara, sum vigar upp til 2.800 kg. Saman við 5-trins girkassanum hevur hann Easy Select 4WD, har til ber at skifta millum 2WD og 4WD, meðan bilurin koyrir við eini ferð upp til 100 km/t. Pajero Sport fæst bæði sum persónvognur og sum Van.

## Opið í vikuskiftinum

Pajero Sport er sera væl útgjørdur og so gott sum alt er standard, sum t.d. ABS bremsuskipan við EBD, heilautomatiskt aircondition, hiti í setrunum, el-síðuspegl við hita, trinbretti á síðunum, útbygdar skermar, alu-felgur og tokulyktir.

Frá Ivan Johansen Bilum verður sagt, at í vikuskiftinum 19. - 20. november verður opið, har m.a. høvið verður at royndarkoyra Pajero Sport. Í hesum sambandi verða eisini nøkur sera góð brúktbilatilboð, sum verða lýst nærri seinni í vikuni. Opið verður leygardagin frá kl. 13-16, og sunnudagin frá kl. 14-17.